# Gerðabók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 4. juli 2024, kl. 19.00

**Bygdarráðslimir á fundi:** Bjørg á Rógvi, Sára Jógvansdóttir, Pauli T. Petersen, Laila Haldansen, Anja Haldansen og John Zachariassen.
**Skrivari:** Rúna Ingunardóttir

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hava Eyðun Hasnen og Ingi Olsen, boðað frá, at teimum bórust frá at møta á fundinum. 1. tiltakslimur John Zachariassen fekk fundarboð tann 28. juni, og játtaði at møta. 2. tiltakslimur Elsi Christiansen fekk ikki fundarboð, vegna seina fráboðan.

Áðrenn fundin greiddi Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, frá, at síðani skráin er løgd, eru tvey nýggj mál innkomin: Forprosjektering til Vestmanna skúla og umsókn um skuldarumskipan. Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um at loyva, at málini verða sett á skrá. Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti. Málini vóru sett á skrá sum mál nr. 295 og 296.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 293**
Eykajáttan til brunatrygd
J.nr.: 30102-1-2023

Leiðandi húsavørðurin mælir til, at Vestmanna kommuna dagførir alarmskipanina í skúlanum og høllini. Kostnaðurin er kr. 149.216 sambært tilboðið frá El-Net. Hetta er ein skipan, sum eisini arbeiðir saman við lásaskipanini.

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 12. juni 2024 mál um brunatrygd í Vestmanna skúla. Nevndin samtykti einmælt at mæla til at samtykkja eina eykajáttan.

Vestmanna Bygdarráð viðgjørdi tilmælið frá Fíggjarnevndini á fundi tann 19. juni 2024. Eykajáttanin á kr. 149.216 varð einmælt samtykt við 1. viðgerð.

**Viðv. 293**
Eykajáttanin til brunatrygd varð einmælt samtykt við 2. viðgerð

**Mál 294**
Eykajáttan til endurgjald fyri væntandi barnaansing
J.nr.: 10000019-2-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 12. juni 2024 mál um endurgjald fyri væntandi barnaansing ísmb. við verkfall. Eingin barnaansing var í Gjáarlon og Látipípuni í 3 vikur. Frítíðaransingin og Skúlabólkurin vóru ikki ávirkað av verkfallinum.
Nevndin mælir til at lata endurgjald fyri væntandi barnaansing. Nevndin mælir eisini til, at gjaldið verður mótroknað við gjaldsskipanini, at tey einans gjalda fyri eitt barn, og at kr. 60.000 verða játtaðar við eini eykajáttan.

Vestmanna Bygdarráð viðgjørdi tilmælið frá Fíggjarnevndini á fundi tann 19. juni 2024. Eykajáttanin á kr. 60.000 varð einmælt samtykt við 1. viðgerð.

**Viðv. 294**
Eykajáttanin til endurgjald fyri væntandi barnaansing varð einmælt samtykt við 2. viðgerð

# Gerðabók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 4. juli 2024, kl. 19.00

**Mál 295**
Forprosjektering til Vestmanna Skúla
8220002-1-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 3. juli 2024 mál um Vestmanna Skúla.

EYA arkitektar mæla til at arbeiða við forprosjektering í 2024. Henda fasa er tann næsta eftir skipanaruppskotið, sum varð samtykt í 2023.

Fíggjarnevndin samtykti einmælt at mæla til at játta kr. 1,5 mió kr. við eini eykajáttan.

**Viðv. 295**
Bygdarráðið samtykti einmælt eykajáttan á kr. 1,5 mió. kr. við 1. viðgerð.

Varð viðgjørt fyri **afturlatnum hurðum**

**Mál 296**
Umsókn um skuldarumskipan
J.nr.: 2534012-1-2023

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20:10

Sign.:

| | | |
|---|---|---|
| Bjørg á Røgvi | Sára Jógvansdóttir | Pauli T. Petersen |
| Laila Haldansen | Anja Haldansen | John Zachariassen |